## Írland-Føroyar 2-0 (2-0):

# Írar í heimsflokki

**Føroyar fingu at kenna, at írar nú eru um at hava eitt lið, sum kann liva upp til avrikini hjá teimum, sum spældu í 1988-1994. Og móti slíkari styrki megnaðu okkara ongantíð at skapa nakran veruligan spenning í dystinum, sum kundi endað nógv verri fyri okkara viðkomandi**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*



*Sum seinni hálvleikur leið, løgdu føroyingar alt meira fyri, og fleiri ferðir kom Óli Johannesen fram sum hóttan í deyðbóltsstøðum*

**Dublin, Írland:**
Tað er einki at ivast í, at írska landsliðið veruliga er um at gerast ein maktfaktorur í europeiskum fótbólti, soleiðis sum teir eisini vóru tað fyri góðum tíggju árum síðani.

Fótbólturin hevur annars ongantíð verið tann heilt stóra ítróttargreinin har um leiðir, har ein gaelisk útgáva av spælinum hevur munandi størri undirtøku. Men at 36.000 áskoðarar fyltu niðurslitna Landsdowne Road leikvøllin móti lítlu Føroyum sigur kortini nakað um, hvussu áhugin fyri liðnum nú er um at eksplodera.

### TRÝST við stórum

Og føroyska fótbóltslandsliðið fekk eisini skjótt at kenna, hví írar nú vænta somikið nógv av sínum monnum. Fyrstu 10 minutt-irnar ella so tóktist annars ikki, sum høvdu írarnir lisið upp á tann partin av heimaarbeiðinum, har tað stendur, at leikferðin vanliga er størsti trupulleiki føroyinga, men skjótt var tað tó, at tummilskrúvurnar vórðu settar á.

Við einum øgiligum press-spælið á miðvøllinum, har okkara valla fingu tíð at nerta bóltin einaferð, áðrenn tacklingarnar vórðu settar inn, forðaðu írar effektivt okkara leikarum í at skapa nakað fram eftir vøllinum, og í álopspartinum hevur liðið so sanniliga eisini góðar streingir at spæla uppá. Ikki minst Damien Duff, sum hesaferð var í álopinum. Bara hann nart bóltin, so hækkaði desibellstyrkin um leikvøllin fleiri stig, og tá hann so ferð eftir ferð nýtti ófatiliga fótskiftið til at koma framvið mótstøðuleikarum, hevði føroyska verjan ofta hug at støkka sundur.

Og longu eftir fyrsta korterinum gekk eisini galið. Alt føroyska liðið bakkaði, tá Duff enn einaferð setti ferð á við bóltinum. Hann sneiddi sær inn í brotsteigin, og tá leikarin so varð feldur, varð dómarin skjótur at blása fyri brotssparki. Hetta setti hin álopsstjørnan á liðnum, Robbie Keane, í kassan, og so mundi leikvøllurin verið lyftur uppfrá. Bæði tí Írland nú var á odda, men so sanniliga eisini tí Keane við hesum setti nýtt málmet á írska landsliðnum.

Tað málið var hansara 22. í røðini, og á hálva tímanum kom enn eitt afturat hesum. Julian Johnsson misti bóltin til Roy Keane, sum setti ferð á omaneftir. Eftir kvikligt 1-2 spæl við Kevin Kilbane, varð bólturin sendur inn um verjuna til púra leysan (og rangstaddan?) Robbie Keane, og tó at Jákup Mikkelsen bjargaði fyrstu royndini, so endaði bólturin aftur hjá Tottenham-leikaranum, og hesaferð sveik hann ikki.

Og eina langa løtu sá út til, at nú kundi hetta gerast heilt óbehagiligt fyri okkara viðkomandi. Írsku álopini skolaðu oman móti føroyska málinum, har Jákup Mikkelsen ferð eftir ferð mátti sýna, hvør dugur er í sær. Nakað skipað spæl fram eftir vøllinum fingu føroyingar ongantíð sett í lag, og tí gjørdist talan mest sum um neyðspørk, sum hvørja ferð vóru byrjanin til nýtt írskt álop.

### Stigini vóru heim

Steðgurin mundi tó koma væl við fyri okkara viðkomandi. Einki er at ivast í, at írarnir eftir fyrstu trý korterini kendu, at stigini vóru í pottinum, og tí settu teir ikki heilt so nógva ferð á í seinna hálvleiki. Samstundis tóktust okkara eisini hava avtalað, at seinastu trý korterini av kappingarárinum altso skuldu gerast ordiligt. Tað vil siga, at teir fyrst og fremst fóru nógv tættari í mótstøðuna, soleiðis at hesir ikki fingu eins lætt spæl, og spakuliga gav hetta eisini okkum møguleika at ota okkum niðan eftir vøllinum.

Heðin á Lakjuni var komin inn fyri Rógva Jacobsen á vinstra borði, og fleiri ferðir eydnaðist at senda djúpt til kvika klaksvíkingin, og tó at tað ikki altíð spurdust innlegg burturúr, so førdi tað fleiri innkøst og fríspørk á skotsku hálvuni við sær. Støður, har føroyingar so ofta áður hava verið vandamiklir, og tó at tað onkra var nær við, at veruligt skot fekst á, so megnaðu vit ikki at hótta Shay Given í írska málinum við hesum.

Næsir við vóru vit, tá gott uppspæl í høgru endaði við, at Atli Danielsen sendi Julian Johnsson avstað í høgru. John Petersen lat flata innleggið fara millum beinini á sær, og so smekkaði Fróði Benjaminsen til, men skotið varð tíverri ikki nóg reint. Stutt undan hesum var um reppið, at Heðin á Lakjuni varð leiktur leysur, men ta ferðina varð álopið steðgað av óneyðugum frísparki, sum Fróði gjørdi móti Keane.

Hinvegin skal ikki gloymast, at Føroyar í Jákupi Mikkelsen høvdu ein ótrúligan seinasta skansa. Óteljandi ferðir fekk hann vart fyri, tá írar høvdu spælt seg ígjøgnum føroysku verjuna, og minst líka ofta forðaði hann veruligum vandastøðum við at stýra føroyska verjuspælinum.



*Saman við Roy Keane sat Kevin Kilbane sera tungt á miðvøllinum fyrstu trý korterini, og tað var rár hending, at føroyingar fingu frið til nakað sum helst*

### Sterkir írar

Sæð úr einum føroyskum sjónarhorni hevði dysturin kanska ikki so nógv at fegnast um, sum vónirnar vóru til, men tað skal so eisini havast í huga, at Írland í dag hels hevur eitt av teimum heilt sterku europeisku liðunum.

Stjørnuleikararnir á liðnum sýndu eisini til tíðir, hví teir eru so høgt virðismettir. Roy Keane var kanska ikki tann, sum rann mest, men hann stýrdi størsta partin av spælinum. Sum ein annar kórdirrigentur segði hann áhaldandi viðleikarunum, hvar bólturin skuldi spælast, og nær ferðin skuldi upp og niður, og yvir høvur var hugtakandi at síggja tað nærum sjónligu auruna, sum er kring ein slíkan leikara.

Legg hartil ótrúliga fótskiftið hjá Damien Duff, máltevið hjá Robbie Keana, framúr verjuleikarar sum Carr, O'Shea, Cunningham og O'Brien, og so er ikki ilt at fata, hví írar aftur eru farnir at tosa um fótbólt. Teir hava eitt lið, sum teir av røttum kunnu vera ernir av, og tað er einki at ivast í, at teir – hóast harða bólkin – í løtuni standa sum besta boðið til til ein vinnara av hesum.

## FAKTA UM DYSTIN

**Írland-Føroyar 2-0 (2-0)**
Landsdowne Road í Dublin
36.000 áskoðarar
1-0: Robbie Keane (br.), 15
2-0: Robbie Keane, 32.
**Dómarabólkur úr Letlandi:** Romans Lajuks, Sergeis Braga, Janis Pukijans, Andrejs Sipailo
Dómaraeygleiðari úr Eysturríki: Johann Hantschk
FIFA-eygleiðari úr Belgia: Roland Tis
**Írland:** 1. Shay Given – 2. Stephen Carr, 5. Andy O'Brien, 4. Kenny Cunningham (liðskipari), 3. John O'Shea (15. Liam Miller, 56.) – 7. Stephen Finnan, 6. Roy Keane, 8. Kevin Kilbane, 9. Andy Reid (18. Gary Doherty, 76.) – 11. Damien Duff, 10. Robbie Keane
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Gary Breen, 13. Matt Holland, 14. Graham Kavanagh, 16. Paddy Kenny, 17. Graham Barrett
**GK:** Andey Reid, 69., Kenny Cunningham, 82.
**Venjari:** Brian Kerr
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen – 4. Pól Thorsteinsson, 13. Óli Johannesen (liðskipari), 5. Jón Rói Jacobsen, 2. Súni Olsen – 9. Jákup á Borg (15. Atli Danielsen, 85.), 8. Julian Johnsson, 7. Fróði Benjaminsen, 6. Rógvi Jacobsen (3. Heðin á Lakjuni, 58) – 10. John Petersen, 11. Jónhard Frederiksberg (14. Andrew av Fløtum, 82.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftur inn:** 12. Hjalgrím Elttør, 16. Jens Martin Knudsen, 17. Kári Nielsen, 18. Arnhold Berg
**GK:** Fróði Benjaminsen, 34., Rógvi Jacobsen, 41., Julian Johnsson, 49.
**Venjari:** Henrik Larsen
**Hjálparvenjari:** Jógvan Martin Olsen
**Liðleiðarar:** Birgir Hansen og Sigurd Hansen
**Fysioterapeutar:** Øssur Steinhólm og Marjun Thomassen.
**Lækni:** Jens Pauli Marstein

